# ldi sær á Vágsbø



meira enn hálvur tími, kanska eini 40-45 minuttir, innan ljóðdygdin er sum hon skal, so er hetta í yvirkantinum.

### Scorpiónin spældi sær við ofrið

Men so spældu teir lagið Holiday! Fjøldin kendist við gamla hittið, lív kom veruliga í, og við eitt var ljóðið sum tað eigur. Hart var tað alla tíðina, men nú var tað eisini gott. Sera gott, og hetta helt sær allan vegin, og nú rullaði rocktokið! Nú riggaði alt!

Hetta var í veruleikanum, sum tá kettan spælir við músina; tað er ein spurningur um tíð, til hon høggur og ger bart.

Yvir 35 ára gamla Scorpiónin hevði spælt sær við ofrið, áðrenn hon veruliga stakk, og gav alt hon átti.

Nú Stóðu allir knøttar júst har, ið teir skuldu standa, og Klaus Meine og hinir ljóðaðu nú, sum teir vanliga gera, og fyri fullum útblástri í størsta anleggi, sum verið hevur í Føroyum.

Betri kann tað ikki gerast.

### Schenker-kondi

Schenker spardi seg ikki, og frá fyrstu stund rann hesin guitarsnillingurin á pallinum og dansaði, meðan rocktrumlan koyrdi við fullari ferð. Og tað var heilt ok, tí maðurin er ongin unglingi longur, so ongin kann vænta hetta, ella krevja tað, men hetta var ógvuliga umboðandi fyri framførsluna hjá bólkinum; garvaðir tónleikarar fyri fullum útblástri og Scorpiónin er ikki merkt av elli.

Meine hevur røddina enn, júst sum vit so væl kenna snjalla týskaran. Eitt vet av týskari dialekt í enska málinum megnar hann at umseta til sjarmu. (Eisini tá hann rópti; "Are you ready to rock??" Og tá hann síðani rósti fólkinum og staðnum og segði, at; "This is breathtaking", og tað í staðin ljóðaði sum "breasttaking". Skemtilig og sjarmerandi!).

Sum heild má sigast um Klaus Meine, at umframt at syngja, so dugur hann eisini at undirhalda, hava samband við stóra mannfjøld, og at fáa fjøldina at syngja og rópa sum eina eind. Júst so sum tað eigur at vera.

Her var kramm í. Og nýggja lagið Humanity hevur longu vunnið sær sess sum ein klassikari í Scorpions-sangbókini.

Eftir røð av góðum løgum og rocktónleiki við dygdarljóðið og fullari styrki, hvurvu teir flestu av palli.

Polski bassleikarin tók yvir eina løtu og vísti sínar dygdir. Eitt sindur frekt kanska, at hann einu løtuna spældi strofur hjá Metallica. Men eftir at bassleikarin hevði víst, at hann óivað er yvir miðal, kom trummuleikarin uppí og tók yvir.

Og tað er ikki ov nógv sagt, at hann jarðlegði alt, sum rørdi seg á Vágsbø, og stýrdi øllum.

Í góðu gomlu rockdøgunum, tá rockurin enn var upprunaligur, var vanligt, at trummuleikarin hevði eina drúgva trummusolo, meðan restin av manningini fekk eitt andarúm.

Og tað gera teir í Scorpions enn. Trummuleikarin hevði eina solo, sum kanska var ov drúgv fyri nøkur, men sum fyri okkum onnur var júst kryddið, sum gjørdi konsertina til eina veruliga rockkonsert, so sum tær eiga at vera og plagdu at vera. Tað var flott. Væl spælt, flott show og hann stýrdi fjøldini á Vágsbø og fekk tey at rópa og annars gera júst tað, sum junglutrummurnar góvu boð um. Hann var eitt ódjór handan trummurnar. Har var ongin ivi.

### Veðurløgini kanska sína ávirkan

Scorpions rockaðu víðari við kendum løgum, sum t.d. Big City Nights. Tað koyrdi bara og konsertin var nú bara ein staðfesting av, at hetta var nakað av tí besta, sum hevur verið á palli í Føroyum. Nú ljóðið var komið á pláss, og var rættilga gott, gekk alt bara sum eftir ánni.

Fjøldin var ivaleys, tá gamla Scorpiónin fór av palli. Her máttu eykaløg til!

Og manningin hjá Klaus Meine var eisini ivaleys. Vit fingu fleiri eykaløg. Har komu Still loving you, Wind of change, Allways somewhere, Rock you like a hurricane og When the smoke is going down.

Tað var, sum høvdu teir ongan hug at gevast. (Og tað høvdu teir óivað heldur ikki, tí seinni hava teir sagt, at hetta var ein av bestu upplivingum teirra á palli).

Og ongin ivi var um teirra spæligleði og at hetta als ikki var ein avgreiðsluspurningur hjá Scorpions.

Gomlu meistararnir eru nú einaferð teir, ið duga kynstrið best,og hóast aldurin, so er onki sum eitur at leypa har garðurin er lægstur. Tað prógvaði tann 2 tímar langa konsertin, sum var eitt ljóð- og ljósbrak, sum flytir framtíðarmørkini í føroyskari festivalsøgu.

Tað var ein dýrdarløta á Vágsbø, har til bar at sanda við tendrara, meðan vørkru løgini ljóðmaðu. So gott var veðrið. Men kanska vóru tað veðurløgini hjá Scorpions, Wind of change og Rock you like a hurricane, ið gjørdu sítt til alla øsingina, sum seinni merkti festivalin. Hvør veit? Kanska østu legendarisku týskararnir sjálvt veðurgudarnar.

Í øllum førum megnaðu teir at skapa eina konsert í Føroyum, sum seint verður gloymd, og sum er sjálvskrivað at standa sera frammaliga í føroyskari festival- og konsertsøgu.

# Reistrup í regni

**Hóast tað regnaði rættiliga illa var væl av fólki komið saman at lurta eftir konsertini hjá Høgna Reistrup fríggjanáttina.**

SUMMARFESTIVAL
*Oddur á Lakjuni*
*oddur82@gmail.com*

Klokkan tvey fríggjakvøldið skuldi Høgni Reistrup við manning á pallin á Torginum.

Scorpions høvdu givið sær rættiliga góða tíð niðri á Vágsbø, so skráin varð heldur seinkað. Festivalgestirnir tyktust tó ikki at nervast av hesum, hóast tað var farið væl útum tíðina. Heilt fitt av fólki stóðu tolin og bíðaðu í regninum eftir at Høgni og teir skuldu koma at spæla.

Endiliga komu so nakrir vælklæddir mans út á pallin. Høgni sjálvur við kassagittara og munnharmoniku, og afturat sær hevði hann seks tónleikarar.

Teir spældu vælpussaðan singer/songwriter popp, nakað í stíl við Lisu Ekdahl. Fyrsta soloføgan hjá Høgna, "Hugafar á ferð" er júst komin út, og tað vóru løgini av henni, sum vórðu framførd á konsertini. Nøkur fólk gingu runt ímillum áhoyrararnar og seldu nýggju føguna.

Høgni hevur sjálvur skrivað sangirnar. Talan var mest um friðarligir sangir, tó at eitt sindur meira lív kom í ímóti endanum. Lýsingarorðið, sum flestum kom til hugs aftaná konsertina var "hugnaligt". Hugnaligur tónleikur, sum tó kanska kundi verða í so hugnaligur í longdini. Onkuntíð kendist tað kanska sum um tað hendi í so lítið í ljóðmyndini.

Ungu tónleikararnir spæla væl saman. Aftaná at nakrir sangir vóru spældir, komu blásarar inn á pallin. Tað riggaði væl, hvussu tað var lagt til rættis við blásiljóðførum afturvið friðarligu løgunum.

Høgni syngur væl, og hann hevur eina nokkso serstaka rødd. Áður hevur mær sjálvum ikki dámt rødd hansara so væl, men hesa løtuna riggaði tað stak væl.

Og Finnur Jensen var í einum heldur ørvísi leikluti enn vit kenna hann; hann stóð í einum horni og sang stuðulsrødd.

Tónleikurin hjá teimum er avgjørt lurtaravinarligur. Og fólki tímdi at lurta. Tí hóast klokkan var farin væl av tvey, og tað fór at regna av grimd, so rýmdi fólkið ikki. Regnskjól og regnklæði vóru tikin í brúk, og heldur legðist tað til av fólki sum konsertin leið. Hon var tó ikki so long, umleið hálvan tíma.

Allan summarfestivalin høvdu konsertirnar á Torginum verið ov spakuligt frá. Tað mesta, sum varð framført á hesum pallinum, var friðarligur tónleikur, og tað varð ofta doyvt av suðinum frá fólkinum, sum stóðu og prátaðu. Men til konsertina hjá Høgna tyktust ljóðmenninir endiliga at hava funnið útav at koyra harðari frá. Ljóðið kom væl út, og fólk lurtaðu eftir, heldur enn at doyva alt við at práta.